## Fleiri pallar

Mærsk Olie og Gas hevur stórar ætlanir í Norðsjónum í summar. Tann størsta einstaka ætlanin er útbyggingin á Halfdan-leiðini, sum skal hava tríggjar pallar afturat. Teir tríggir pallarnir viga tilsamans 13.000 tons, og tað er næstan tvær ferðir meiri, enn Eiffeltornið í París vigar. Út-byggingin á Halfdan-leiðini kostar góðar tvær mia. krónur, men hon fer eisini at hava við sær, at dagliga fram-leiðslan, sum nú er 100.000 tunnur, veksur munandi.

## Bussførari svímaði

Ferðafólkini í einum donskum ferðamannabussi vóru stak heppin ikki at fáa skaða, tá førari teirra brádliga svímaði á einum motorvegi í Suðurtýsklandi. Førarin fekk brádliga pínu í búkin, og hann gjørdi tí av at snara inn á eitt steðgipláss. Men tíverri misti hann vitið, áðrenn hann fekk steðga bussinum, sum rendi á tríggjar lastbilar, áðrenn hann snaraði út aftur á motorvegin. Men tá raknaði bussførarin við aftur og fekk tamarhald á bussinum.

# farnir at taka síl



*Á Viking Seafood á Strondum hevur sláturvirksemið ligið stilt síðan við ársenda, men í morgun fóru tey í gongd aftur. Væntandi verður støðugt arbeiði á virkinum restina av hesum árinum*

í morgun, at varðveita kjarnuna, sum hevur verið grundarlagið undir arbeiðs-gongdini.

- Vit hava ikki fingið øll fólkini aftur, men tað hevur stóran týdning fyri okkum, at nøkur roynd fólk eru við aftur. Tað er sjálvandi lættari at byrja aftur við fólki, sum hava arbeitt við hesum áður, sigur hann.

Flestu av teimum, sum arbeiða hjá Viking Seafood, eru úr økinum á vestara armi á Skálafjørðinum.

- Vit eru farin í gongd aftur við góðum treysti, sigur Brandur Jacobsen, stjóri á Viking Seafood.



*Sílini verða kruvd, vaskað og pakkað. Ein partur verður ísaður feskur, og ein partur verður avhøvdaður og frystur*



*Hesa vikuna landa teir bara upsa í Klaksvík. Línuskipini koma helst ikki innaftur fyrr enn eftir hvítusunnu*

Mynd: Vilmund Jacobsen

# Seks trolarar landa í Klaksvík

**Eingi línuskip hava landað í Klaksvík hesa vikuna, men land-ingarformaðurin hjá Landingarmiðstøð Føroya í Klaksvík væntar, at tey fyrstu línuskipini koma inn aftur at landa beint eftir hvítusunnu**

FISKIVINNA

*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Á Landingarmiðstøð Føroya í Klaksvík vænta tey fleiri partrolarar við upsa hesa vikuna.

Fýra partrolarar landaðu í gjár.

Safir og Smaragd høvdu sløk 120.000 pund tilsamans, og Navarin og Borgarin, sum eru gomlu Polarhav og Stjørnan, høvdu eisini umleið 120 pund tilsamans.

Mikudagin vænta tey Fjalshamar og Nónhamar, og tá Landingarmiðstøð Føroya frætti frá teimum í gjár, høvdu skipini umleið 200 kør inni.

Kørini taka umleið 290 kilo hvørt.

Pól Fuglø, landingarfor-maður, heldur ikki, at upsa-skipini í Klaksvík lata so væl at fiskiskapinum í løtuni.

Men tað eru ikki øll upsaskipini, sum lata illa at.

Sosialurin veit at siga, at eitt nú Bakur og Stelkur, sum Faroe Seafood eigur, hava gjørt tveir rættiliga góðar og stuttar túrar í seinastuni.

### Eingi línuskip

Eingi línuskip hava landað í Klaksvík hesa vikuna, men væntandi er, at tey fyrstu koma aftur av túri beint eftir hvítusunnu.

Pól Fuglø sigur, at Núpur, sum er í Íslandi, hevur latið hoyra frá sær, og teir lata ikki so væl at fiskiskapinum í løtuni.

- Eg vænti, at Núpur kemur beint eftir hvítusunnu, og tá vænti eg eisini, at onn-ur línuskip koma innaftur at landa, sigur landingar-formaðurin.